

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 04 - 2012

# Norskur oljufelagsskapur vil vera enn meira sjónligur

Felagið hjá oljufeløgunum, ið arbeiða á norska landgrunninum og norskum veitarum til olju- og frálandavinnuna, OLF (Oljeindustriens Landsforening) fer í framtíðini at eita Norsk olje og gass. Hetta varð avgjørt á aðalfundi í felagnum nú um dagarnar. Navnabroytingin fer fram til heystar. Vit skulu vera meira sjónlig. Við at skifta navn fara vit betri enn í dag at kunna vísa, hvørjum vit arbeiða við og fyri hvønn, sigur fyrisitingarligi stjóri í OLF, Gro Brækken. Bæði olju- og gassvinnan og samfelagið annars eru nógv broytt síðani vit fingu núverandi navn í 1989. Okkara felagsskapur hevur eisini verið fyri broytingum. Við at skifta navnið til Norsk olje og gass vísa vit enn betri, hvønn vit arbeiða fyri og at vit umboða alla norsku olju- og gassvinnuna við bæði oljufeløgum og veitarum, sigur Brækken. Bretska navnið fer at vera Norwegian oil and gas association. Føroyska systurfelagið hjá OLF er FOIB, sum stendur fyri Føroya Oljuídnaðarbólkur ella Faroes Oil Industry Group. Meðan norska felagið umboðar bæði oljufeløg og veitarar, so umboðar føroyska felagið í dag oljufeløgini, sum hava leitiloyvi á landgrunninum. Undir Vinnuhúsinum er annars eisini eitt felag, sum hevur tilknýti til oljuverðina. Tað er Føroya Oljuídnaðarfelag ella Faroe Oil Industry Association. Í felagnum eru føroyskar fyritøkur, sum veita tænastur til olju- og frálandavinnuna ella sum hava ætlanir og ynski um tað. Bretska felagið, sum er álíkt tí norska, ber heitið Oil & Gas UK. Føroyska FOIB hevur júst verið á vitjan hjá norsku og bretsku systurfeløgunum og knýtt sambond til hesi feløgini. (Meira um hetta á oljan.fo seinni) Mynd - Gro Brækken, forkvinna í OLF, Oljeindustriens Landsforening heldur felagið skal vera enn meira sjónligt og fer til heystar at broyta navn til "Norsk olje og gass". Mynd OLF